SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Sjúkrahúsverkið

# Trivnaðarkanning

Útboð – apríl 2024

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo

ls.fo

# Innihald

Innleiðing ........ 2
Lýsing ........ 2
Stødd ........ 2
Kravfesting ........ 3
Avtala og karmar ........ 4
Meta um tilboðini ........ 4
Tilgongdin frameftir ........ 4
Fyrivarni og alment innlit ........ 5



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## Innleiðing

Sjúkrahúsverkið bjóðar út trivnaðarkanning. Útboðið verður gjørt sambært ”Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum”.

Útboðstilfarið inniheldur, umframt hetta skjalið, eisini eitt organisatiónsdiagram.

## Lýsing

Sjúkrahúsverkið skal gera eina umfatandi trivnaðarkanning, fyri at meta um trivnaðin hjá starvsfólkunum á teimum trimum sjúkrahúsunum. Vit ynskja at fáa eina heildarmeting av trivnaðinum, bæði innan fyri sálarliga arbeiðsumhvørvið og arbeiðsumhvørvið sum heild. Trivnaðarkanningin skal vera við til at geva eina mynd á øllum stigum (niveau’um) av trivnaðinum hjá starvsfólkunum í Sjúkrahúsverkinum. Harafturat skal trivnaðarkanningin nýtast sum eitt strategiskt amboð til at varðveita og styrkja Sjúkrahúsverkið sum eitt dragandi og virkið arbeiðspláss, har trivnaður er í hásæti.

## Stødd

Áleið 1.300 starvsfólk, deild yvir trý sjúkrahús.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## Kravfesting

| | |
|---|---|
| Dagfesting | Trivnaðarkanningin fyri 2024 skal setast í verk/sendast út til starvsfólk á heysti 2024. Hereftir verður miðjað ímóti at hava trivnaðarkanningar annaðhvørt ár og eisini skal vera møguligt at velja uppfylgjandi kanning í millum trivnaðarkanningarnar.<br><br>Ynskiligt er, at hava úrslitini frá kanningini í 2024 greinaði og okkum í hendi í oktober/november 2024. |
| Projektleiðsla | Vit vilja at veitarin fylgir okkum í allari tilgongdini – frá byrjan til enda. Hetta merkir í fyrireikingararbeiðinum, ímeðan trivnaðarkanningin er í gongd og eftir at trivnaðarkanningin er send út og úrslitini fingin til vega. |
| Trivnaðarkanningin | Vit síggja fyri okkum eina trivnaðarkanning, har øll ella mest sum øll starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum svara á talgildum miðli. Starvsfólkini skulu vera dulnevnd í kanningini. Vit vænta eitt spurnarblað við áleið 30-40 spurningum. |
| Ábyrgd | Veitarin skal kunna hava ábyrgd av at alt arbeiðið er gjørt rætt og hava ábyrgd av at koyra sjálva trivnaðarkanningina. Eisini skal veitarin viðgera tilfarið eftir at starvsfólkini hava svarað kanningini og lýsa hvørji øki mælt verður til at arbeiða víðari við og hvørji øki eru nøktandi. |
| Úrslit | Neyðugt er at síggja úrslitini á ymiskum stigum (niveau'um):<br>• samlað úrslit fyri Sjúkrahúsverkið<br>• samlað úrslit fyri hvørt sjúkrahús<br>• úrslit fyri hvønn depil (bert galdandi fyri Landssjúkrahúsið)<br>• úrslit fyri hvørja deild. |
| Mál | Neyðugt er at trivnaðarkanningin er á minst tveimum málum – føroyskum og enskum. |
| Talgildur pallur | Vit vilja hava ein felags pall, har leiðarar í Sjúkrahúsverkinum kunnu arbeiða við úrslitunum. Ein pallur sum er talgildur og ger tað visuelt gott og nemt hjá leiðarum at arbeiða við kritisku økjunum og síggja jaligu økini á síni deild. Øll úrslitini skulu vera á hesum talgilda palli, so ovasta leiðsla kann síggja heildina fyri Sjúkrahúsverkið, samstundis sum til ber at síggja úrslitini fyri einstøku deildirnar/deplarnar. |
| Verkstova | Vit vilja hava møguleika fyri at kunna velja, at úrslitini verða løgd fram fyri leiðarum og eisini at víst verður hvussu arbeiðast skal við úrslitunum, t.d. á einari verkstovu. |
| Samband | • Øll tilboð skulu latast inn umvegis teldupostin hr@ls.fo<br>• Somuleiðis viðvíkjandi spurningum og svarum. Spurningar og svar verða viðgjørd anonym og verður svarað leypandi fram til tíðarfreistina. |

## Avtala og karmar

Avtala verður gjørd við ein veitara av trivnaðarkannigini og tí, sum har til hoyrir.

Veitarin, ið vinnur útboðið, skal halda seg til tilboðið í tilgongdini, og seta vit tíðarfreistir í felag.

## Meta um tilboðini

Tað er umráðandi at tryggja góðskuna, tá ið mett verður um innkomnu tilboðini. Vektingin av innkomnu tilboðunum verður gjørd soleiðis:

50% kostnaður
50% góðska

Útrokningin fer fram á hendan hátt:

Góðska: Her meinast við royndir og tilvísingar. Út frá eini samlaðari meting – út frá royndum og tilvísingum – verður eitt stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal. Vit gera vart við, at hetta er okkara kvalitativa meting av góðsku.

Kostnaður: Tilboðið við lægsta samlaða kostnaði fær 50 stig. Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli:



$$\frac{\text{Lægsti tilboðsprísur}}{\text{Tilboðsprísur}} \cdot 50$$

Tað tilboðið, ið fær hægst stigatal vinnur útboðið og rættin um samstarv viðvíkjandi trivnaðarkanning í Sjúkrahúsverkinum.

## Tilgongdin frameftir

Sjúkrahúsverkið bjóðar við hesum uppgávuna at gera trivnaðarkanningar í útboð við freist, sí niðanfyri. Talan er um afturvendandi trivnaðarkanningar og skal tilboðið tí vera galdandi tey komandi trý árini.

Tá ein veitari er funnin verður trivnaðarkanningin endaliga ment í samstarvi millum Sjúkrahúsverkið og veitaran.

Tíðarætlan:

- Vika 15: útboðið tøkt á útboðspallinum – 10. apríl 2024.
- Vika 16 og 17: veitarar spyrja um ivamál. Freist at spyrja er 24. apríl 2024 kl. 12:00 og skulu spurningar sendast til hr@ls.fo. Spurningar eftir tíðarfreistina verða ikki svaraðir.
- Vika 18: tann 1. mai kl. 12:00 er freist at lata tilboð inn. Tilboð latin inn eftir hetta, verða ikki viðgjørd.
- Vika 19 og 20: viðgerð av tilboðunum.
- Vika 21: Sjúkrahúsverkið tekur avgerð og fráboðan verður send veitarunum í seinasta lagi tann 22. mai 2024 kl. 16:00.

Úrslitið verður kunngjørt á Keypsportalinum og sent øllum tilboðsgevarunum umvegis teldupost. Tilboðið er ikki endaligt fyrr enn báðir partar hava skrivað undir sáttmálan.

## Fyrivarni og alment innlit

Tann, ið letur inn tilboð, eigur at hugsa um fyrivarni í mun til útboðstilfarið. Eitthvørt fyrivarni viðførir at Sjúkrahúsverkið kann vísa burtur innlatið tilboð.

Sjúkrahúsverkið tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum. Eisini tilskilar Sjúkrahúsverkið sær rætt til at havna einum tilboði, um vøran, ið verður bjóðað framm, er uttan fyri rímiligt mark, tá talan er um góðsku.

Fæst ikki ein sáttmáli við ein veitara, tilskilar Sjúkrahúsverkið sær rættin til at býta vørubólkarnar upp í fleiri partar, og samráðast víðari við einstakar tilboðsgevarar við støði í innkomnu tilboðunum.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo